Fróðskaparsetur Føroya

28. mai 2004

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 7/2004**

Tíð: Fríggjadagin 28. mai 2004, kl. 13 – 14.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 6/2004 setursráðsfundi 29. apríl 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógarbýtið 2004** (J.nr. 0015-01111). *Fundarskjøl: Uppskot til býti, dagfest 21. mai., 13 s.* Setursskrivarin greinaði tølini. Semja um, at tað er neyðugt at seta pening av til KT-tænastuna, hóast fíggjarkarmurin er trongur. Uppskotið til býtið varð samtykt við rættingum. SSS kunnar deildirnar.

4. **Náttúruvísindadeildin mælir til, at Morten Sparre Andersen verður settur sum adjungeraður professari á deildini frá 1. mai 2004.** (J.nr. 0022-00729). *Fundarskjal: Tilmæli frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 30. apríl 2004 , 1 s.* Ráðið tók á fundi 1/2004 undir við málinum. Samtykt at seta Morten Sparre Andersen sum adjungeraður professari frá 1. mai 2004. SSS avgreiðir málið.

5. **Námsskipanir á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. 0041-01367). Punktið tikið av skránni, tí tað er ikki klárt til støðutakan. Kemur fyri á fundi á Føroyamálsdeildini 4. juni og verður síðani lagt fyri setursráðið.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

6. **"Opnar dyr" á Fróðskaparsetrinum í heyst.** (J.nr. 0018-01254). *Fundarskjal: Uppskot frá MM og TS, dagfest 24. mai, 1 s.* MM legði uppskotið fram. Kjak um ymisk tiltøk. Semja um at halda tiltakið 1. oktober. Arbeitt verður víðari við málinum.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 18.5.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 18.5.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Føroyamálsdeildini 26.5.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

8. **Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Idu Skaar, djóralækna, seniorgranskara, National Veterinary Institute í Oslo sum próvdómara í *Smálívfrøði*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-00781). Staðfest.

9. **Rektarin hevur millum funda játtað tveimum studentum á Føroyamálsdeildini stuðul, 5.000 kr í part, til ferð til summarnám í Tromsø av peningi setursins til føroyskt-norskt samstarv. At staðfesta.** (J.nr. 0073-01362). Staðfest.

**Kunningarmál:**

10. **NUAS-seminar í Turku 22.-24.8.04 "Gratis lokaler – eller lokaler som styrmedel".** (J.nr. 0014-01364).

11. **"Strømninger i Nordatlanten" en præsentation af Det Nordatlantiske Forskningsprogram – Dansk Polarcenter.**

12. **Ársskýrsla 2003 - Stofnun Árna Magnússonar á Íslandi.**

13. **Ársfrágreiðing 2003, Den Nordatlantiske Gruppe i Folketinget.**

14. **Carlsbergfondet Årsskrift 2004.**

Frágreiðing: Annika Sølvará